# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 16. desember 2009


# Noreg stóð royndina



Íslendski venjarin hjá Noreg, Tór Hergeisson, var ovurfegin, tá lið hansara hevði vent vónleysari støðu til sigur

**Móti Spania var Noreg aftan fyri við seks málum í steðginum, men tær megnaðu kortini at spæla seg í hálvfinaluna í HM í kvinnuhondbólti**




Heri Simonsen

Norska kvinnulandsliðið í hondbólti hevur rokkið enn einari hálvfinalu. Hetta gjørdist veruleiki, tá norsku kvinnurnar vunnu oddadystin í millumspælinum ímóti Spania. Dysturin endaði 27-24 til Noreg.

Tað sá tó svart út í fyrra hálvleiki, tá einki gekk eftir vild hjá Noregi, og var støðan 14-8 til Spania, tá liðini fóru til hálvleik.

Men í seinna hálvleiki gjørdu norsku kvinnurnar eitt øðilig comeback. Tá fimm minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki, var spanska leiðslan trý mál, og tá 10 minuttir vóru farnir, var Spania á odda við bert tveimum málum. Norska verjan fann stórspælið fram, og tá eitt korter var farið, javnaði Noreg til 18-18.

Seinasta korterið var Noreg klárt betri, og vann at enda rættiliga trygt. Talan er um ein stóran persónligan sigur fyri íslendska venjaran, Tórir Hergeirsson, sum tók yvir aftaná Marit Breivik, sum vann 11 EM, OL og HM-heiðursmerki við norska liðnum.

# Eingin hálvfinala til Danmark

**Tapi móti Angola gjørdist dýrt hjá Danmark, sum í gjár tapti 30-25 móti Russlandi**




Jákup Mørk

Dysturin varð spældur tíðliga seinnapartin í gjár, og fyrstu løtuna gekk sera javnt á í tempo-fyltu uppgerðini.

Undan steðginum dróg Russland frá, og hóast Danmark fleiri ferðir minkaði munin niður í tvey mál, so megnaðu tær ikki av álvara at skala russisku kvinnurnar, sum alla tíðina hildu høvdið kalt og koyrdu sigurin heim.

Tað byrjaði annars so væl hjá Danmark, sum vann fyrra bólkaspælið. Í millumspælinum taptu tær móti Svøríki og Angola, og serliga seinna tapið av hesum kom illa við. Tí gjørdist dysturin móti russum púrasta avgerandi, og her eydnaðist altso ikki Danmark at vinna.



Fleyr skal í kvøld til Kollafjarðar at styrkja sær um støðuna á stigatalvuni, og í annaðkvøld skal Mjølnir ímóti Drátti á Giljanesi gera tað sama

Mynd: Hilmar Jan Hansen

# Mjølnir og Fleyr vilja halda stand

**Kappingin í Eik-liguni hjá kvinnum nærkast jólasteðginum. Í kvøld spælir Fleyr á útivølli ímóti KÍF, og í annaðkvøld skal Mjølnir á útivølli møta Drátti**




Hilmar Jan Hansen

Tvey av fremru liðunum í Eik-liguni hjá kvinnum hava í kvøld og í annaðkvøld møguleikan at styrkja sína støðu og møguleikarnar fyri einum plássi í FM-finalunum í mars mánaði. Sum er, er SÍ so mikið langt fremst, at har verður neyvan meira enn finaluplássið hjá hinum at kappast um.

Annað av liðunum, sum kann taka seg longur fram á stigtalvuni, er Fleyr, ið skuldi havt fólkið til at kappast heilt har frammi, men hevur havt ov óstøðug avrik. Í kvøld klokkan 19.30 skal Fleyr til Kollafjarðar at spæla ímóti KÍF, og óansæð vantandi støðufesti, er Fleyr stórfavorittur at vinna henda dystin.

## Mjølnir ímóti Drátti

Hitt liðið, ið eisini kann gera ein vørr, er Mjølnir, sum higartil hevur sæð út sum besta boðið upp á ein finalist aftur at SÍ. Mjølnir hevur tikið seg nógv fram og hevur væl og virðiliga megnað at varðveitt annaðplássið, sum liðið hevur havt alla tíðina.

Mjølnir skal í annaðkvøld klokkan 18 royna seg ímóti Drátti, sum er tað lægsta av teimum liðunum, ið kappast um finalupláss. Úrslitini hjá Drátti hava ikki verið eftir vild, men liðið tykist vera í ferð við at fóta sær. Tó má Mjølnir roknast sum favorittur, og alt annað enn ein sigur til klaksvíkskvinnur má metast sum eitt rættiliga óvæntað úrslit.

Dystirnir í kvøld og í annaðkvøld eru tveir av teimum trimum síðstu, áðrenn Eik-ligan hjá kvinnum fer í jólafrí. Tann triði verður leygardagin klokkan 14, tá TB í Trongisvági tekur ímóti ÍF.

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | | | | | vunnin | tapt | sett- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | dystir | v | - | t | sett | sett | munur | stig |
| 1 | SÍ | 9 | 9 | - | 0 | 27 | 3 | 24 | 18 |
| 2 | Mjølnir | 8 | 6 | - | 2 | 20 | 10 | 10 | 12 |
| 3 | TB | 8 | 5 | - | 3 | 18 | 10 | 8 | 10 |
| 4 | Fleyr | 9 | 5 | - | 4 | 17 | 16 | 1 | 10 |
| 5 | Dráttur | 9 | 4 | - | 5 | 17 | 16 | 1 | 8 |
| 6 | ÍF | 9 | 1 | - | 8 | 3 | 24 | -21 | 2 |
| 7 | KÍF | 8 | 0 | - | 8 | 1 | 24 | -23 | 0 |